økisnavn.fo

# Útboð av Frontend-skipan fyri økisnavn.fo

## Spurningar og svar 3. november 2023

| Nr | Spurningur | Svar |
|---|---|---|
| 1 | Hvat merkir tað, at dátur skulu skipast við “metadata”? (A. 2) | Tað merkir at síður skulu hava relevant meta tags. Sum tað minsta Basic Metadata, sí https://ogp.me/ |
| 2 | Skal tað vera møguligt at stovna undirsíður, sum ein kann við CMS-skipanum, ella er tað nøktandi, at skipanin hevur nakrar fastar síður, t.d. tíðindi, sum kunnu umsitast? (A. 3) | Tað er nøktandi at skipanin hevur nakrar fastar síður, ið kunnu umsitast. Harumframt skal tað vera gjørligt at leggja tíðindi út. |
| 3 | Hvønn eru brúkaravegleiðingarnar til (innanhýsis nýtslu ella almenningin)? Á hvørjum máli skulu tær gerast? Og í hvørjum formati skulu tær gerast (PDF, video ella annað)? (A. 8) | Brúkaravegleiðingarnar eru til almenningin. Tær skulu vera á føroyskum. Veitarin avgerð sjálvur hvussu vegleiðing arnar skulu gerast, bara tær tæna endamálinum. |
| 4 | Hvørji krøv verða sett í sambandi við logging, t.d. hvar loggar skulu goymast (t.d. í eksternari skipan), hvussu leingi teir skulu goymast, hvør sleppur framat loggunum, um og hvussu verður leitað í loggunum | Allar gerðir í sambandi við broytingar í einum økisnavni skulu loggast. Hetta kann gerast í skipanini og skal kunna vísast í umsitingarsíðuni. Umsitarar kunnu leita í loggunum. Loggar viðvíkjandi einum ávísum økisnavni skulu kunna vísast saman. |
| 5 | Er tað rætt skilt, at í sambandi við skjalfesting, eru vanligir menningarhættir og hóskandi kommentering av kotu nøktandi skjalfesting? (B. 3) | Ja |
| 6 | Er tað rætt skilt, at tað ein brúkari kann velja, um hann ritar inn við Samleikanum ella við brúkaranavni og loyniorði? (B. 4) | Ja |

| | | |
|---|---|---|
| 7 | Hvussu skulu vit greiða frá – og/ella skjalfesta – at síðan verður renderað innan 3 sek? (B. 5) | Tað skal vera yvirskipað greitt frá í tilboðnum, hvussu tit ætla at tryggja hesum. Tá síðan verður leverað, verður eftirkannað at tað er so. |
| 8 | Hava tit tørv á at nýta farspor til annað enn hagtøl? (B. 6) | Økisnavn.fo hevur ikki ein tørv á at tað eru farspor. Um farspor verða nýtt av skipanini, skal brúkarin góðkenna skrásetingina av farsporum. Tað er hvørki fyrimunur ella vansi um farspor mugu nýtast. |
| 9 | Hvussu hugsa tit at brúka versionering? Hví er tørvur á at hava tíðindi í fleiri útgávum? Hvat fyri sløg av skjølum er talan um? (B. 7) | Hetta er ein villa, við skjali meinast nýggjastu tíðindini. Krav um versionering er ikki neyðugt. Tað skal tó verða gjørligt at hava tíðindini ópubliseraði (kladdu) og at kunna seta tíðaravmarking á, nær tey verða víst. |
| 10 | Kann Økisnavn.fo útgreina, hvørjar frágreiðingar (rapportir) skipanin skal gera? (E. 1) | Tað er umráðandi at skipanin kann vísa rapportir sum til dømis:<br>• Um skrásett økisnøvn, dagliga, vikuliga, mánaðarliga og árliga.<br>• Hagtøl fyri økisnøvn við føroyskum stavum skulu eisini vera tøkar.<br>• Rapportir sum vísa hagtøl yvir DNSSEC signeringar.<br>• Rapportir sum vísa ambætarar. |
| 11 | Eru nøkur serlig krøv til 2FA hentleikarnar? (D. 25) | Eingi serlig krøv uttan at tað skal vera trygt. Til dømis er nøktandi at brúka sms ella ein Authenticator app. |
| 12 | Hvørji krøv verða sett veitaranum í sambandi við KT-trygd? | Tað eru ikki serlig krøv sett, men hugt verður eftir mannagongdum og førleikum hjá fyritøkuni. |
| 13 | Er tað ein fyrimunur, um veitarin kann vísa á KT-trygdarpolitikk, váðametingar, KT-trygdarsertifiseringar o.a.? | Hetta er ikki tilskilað í útboðnum, men væntað er at veitarin livir upp til lógarkrøv um KT trygd og dátuviðgerð. |
| 14 | Er tað rætt skilt, at veitarin skal syrgja fyri rættlestri og umseting? | Ja |
| 15 | Er tað rætt skilt, at Økisnavn.fo, ger sáttmálan í sambandi við menningina av skipanini? | Ja |

| | | |
|---|---|---|
| 16 | Eru nøkur krøv í sambandi við, hvar skipanin skal hýsast? Um ja, kunnu tit vísa á hesi krøvini? (F.2) | Rætting til F2: Tað er ikki krav at koma við tilboð fyri hýsing.<br><br>Ynskiligt er, at nýggja skipanin verður hýst á sama stað sum verandi loysn. Men tilboð eru vælkomin. |
| 17 | Hevur Centralnic eitt staging-umhvørvi, sum vit kunnu testa við? | Ja. |
| 18 | Nær er væntað at skipanin kan verða liðugt og leverað? | Ynskiligt er at skipanin er liðug og klár at taka í nýtslu uml. 1. mai |
| 19 | Hvørjum hyggja tit eftir, tá ið tit siga 50% kostnaður og 50% tænasta? | Her verður gjørd ein heildarmeting av veitingini. |
| 20 | Í mun til ynski um snið, hava tit dømi um heimasíður, ið tit halda veita eina góða brúkarauppliving? | Á kunnandi fundi við møguligar veitar vístu vit á síður sum punktum.dk og registrar síður sum godaddy.com og one.com. |